# Barnafagnaður 2003 í Klaksvík

**Við skrúðgongu, ballónum og tiltøkum endaðu ansingarstovnarnir í Klaksvíkar kommunu eitt samstarv, sum hevði vart í tríggjar vikur. Børn og starvsfólk lata væl at samstarvinum, sum í ár var undir evninum Myndlist**

BARNAFAGNAÐUR 2003
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Við trummuspælarum og skeltaberarum á odda, kom skrúðgongan heimeftir Klaksvíksvegi, sum var fullur av fólki. Tey flestu mundu helst vera foreldur. Nógv mynda- og upptøkutól vóru at síggja allastaðni. Onkur hevði tó ikki fingið við, at Barnafagnaður og skrúðgonga var hendan dagin, so fleiri bilar stóðu fram við vegnum, meðan børnini fóru framvið.



*Ein av teimum størstu skrúðgongunum nakrantíð í Klaksvík, tá øll børnini í ansing í Klaksvíkar kommunu komu gangandi*

Børnini høvdu nógvar trummur, og tær vóru bæði úr Cadbury Roses, Quality Street og okkurt málingablikkið eisini. Men tað larmaði nógv, og tað lá væl fyri hjá teimum at spæla í takt.

Stuttligt at síggja, hvussu errin tey smíltust til foreldur ella systkin so hvørt, sum tey fingu eyga á tey.
Hóast tað hevði hug at regna, so vóru rættuliga nógv fólk komin út at síggja hesi fittu børnini ganga í skrúðgongu.

Skrúgongan, sum byrjaði í Klaksvíksgarðinum, fór beint niðan á fótbóltsvøllin. Vælílatin við ballónum í fleiri litum gingu øll niðan á vøllin. Aftast komu tey, sum ganga í dagrøkt. Flestu teirra í vognum. Øll í reyðum Silva T-troyggjum út yvir dýnujakkarnar og føroysku troyggjurnar, og tey fara spent inn á vøllin.

Fyrst komu tvær av fyrireikarunum, Súsanna og Marjun, á pallin at greiða frá, hvat fór at henda. Síðani komu systrarnar báðar Arnfríð og Rannvá Lützen at syngja barnasangir. Løg sum Flippan og onnur góvu øllum hug at standa og smádansa.

Síðani komu tríggir klovnar á pallin. Til miklan látur fyri børnini, spæla tey eina løtu. Og so aftur Arnfríð og Rannvá. Hesuferð saman við Hans Hjalta Skaale, sum spældi guitar. Og saman við klovnunum sungu tey Ein lítil laksur eri eg, Lítla brúgv og so framvegis.

Tiltakið endaði so við, at øll børnini fingu Sunkist og karamell.

### Samstarv

Marjun Lassen, leiðari í Dr. Margrethubarnagarðinum, sigur, at hetta er aðru ferð, at tey royna tílíkt samstarv millum allar ansingarstovnarnar í Klaksvík. Og tey lata øll væl at hesum tiltakinum. Børnini hava arbeitt hugagóð í tríggjar vikur við evninum Myndalist, og tey hava verið sera spent.

– Tað týdningarmiklasta í hesum hevur verið, at her hava børnini fingið høvi til at arbeiða sjálvstøðugt, og tey hava kunnað gjørt tað, sum tey ynsktu. Við vegleiðing frá teimum vaksnu sjálvandi. Men tað er ongin ivi um, at tað er hugaligt hjá teimum at arbeiða soleiðis. Sjálvt tey, sum vanliga ikki tíma so væl at mála og annað, hava verið væl við upp á hetta, greiðir hon frá.

Alt tað, sum børnini hava arbeitt við seinastu tríggjar vikurnar, var seinni um kvøldið fríggjadagin sett upp í eini framsýning í Býráðshúsinum. Og hon var sera væl vitjað.

– Allatíðina stóð ein javnur streymur av fólki inn, so tað var virkuliga stuttligt, sigur Marjun, sum er ikki sørt ovfarin av stuðlinum, sum tiltakið fríggjadagin fekk.



*Børnini høvdu tómar karamellueskjur og málingablikk, sum tey spældu trummu uppá*



*Arnfríð og Rannvá Lützen framførdu nakrar av teimum kendu barnasangunum hjá Kulum Rótum*



*Tá tiltakið var komið at enda, fingu øll børnini Sunkist og Karamel*



*Børnini hugnaðu sær, og tey vóru sera upptikin av klovnunum*



# Bill Justinussen vil hava hægri avgjald á sodavatn

**Tað er landsstýrismaðurin í heilsumálum, sum vil hava hægri avgjald á sodavatni og hann útihýsir ikki, at tað fer at hækka enn meir**

BOMMAVGJALD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er landsstýrismaðurin í heilsumálum, er er upphavsmaður til umstrídda bommavgjaldið.

Bill Justinussen sigur, at hann hevur fleiri ferðir skotið upp at hækka avgjaldið á sodavatni og hann tekur fult undir við, at tað nú verður hækkað.

Síðani tað kom fram í ljósmála, at ætlanin er at hækka avgjaldið á sodavatni einar tvær krónur fyri liturin, hevur stóri spurningurin verið um hetta hevur verið fyri at fylla eitt hol í landskassanum ella um hetta hevur verið fyri at avmarka nýtsluna.

Sjálvur hevur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum alla tíðina hildið fast um, at tað er av heilsuligum ávum, at avgjaldið á sodavatni hækkar og at endamálið er at avmarka nýtsluna.

Næstan øll hini hava tvíhildið um, at hetta var eina og aleina fyri at fáa nakrar krónur eyka í landskassan.

Men nú váttar Bill Justinussen, at tað er hann, sum vil, at avgjaldið skal hækka og staðfestir sostatt frágreiðingina hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum um, at tað er eitt heilsumál, at hækka avgjaldið.

– Mítt endamál við hesum er at verja heilsuna hjá børnunum og teimum ungu, sigur Bill Justinussen.

Hann sigur, at øll, sum hava við børn og ung at gera, øtast yvir, hvussu nógv sodavatn tey drekka.

– Tað verður meiri og meiri vanligt, at børn heilt niður í 10 ár fáa tað slagi av sukursjúku, sum vit á mannamunni nevna gamlamanna-sukursjúku og tað var at kalla ókent fyrr.

– Og talið á hesum børnum bara økist og mugu vit royna at byrgja upp fyri, sigur Bill Justinussen.

Hann sigur, at tann stóri trupulleikin er, at vit síggja ikki fullu avleiðingarnar av hesi vaksandi nýtsluni, fyrrenn um eini 20-30 ár, tá í fleiri ára "misbrúk" fer at merkjast aftur í heilsuni á fólki.

### Spurningur um hetta er nóg mikið

Bill Justinussen sigur, at hann følir avgjørt ábyrgd á hesum øki og hann sigur, at tað er ein spurningur, um avgjaldið, sum nú verður lagt á sodavatn, er nóg mikið.

– Avgjaldið,vit nú leggja á, broytir kanska ikki tað stóra. Men tað er so fyri at vísa fólki, hvat vit halda um hesi viðurskiftini.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann nú fer at seta kanningar í verk fyri at fáa turr tøl á borðið fyri, hvussu mat- og drekkivanarnir hjá børnum og ungum eru.

Hann sigur at úrslitið av teimum kanningunum verða síðani brúktar at leggja politikkin frameftir til rættis. Tí kann tað eisini enda við, at avgjaldið fer enn longur upp.

Bill Justinussen heldur nevniliga, at avgjaldið kundi saktans verið hægri.

– Eg haldi, at endamálið við avgjaldinum skal vera, at tað skal merkjast ordiliga.



*Bill Justinussen, landsstýrismaður í heilsumálum, heldur, at tað er ein spurningur um avgjaldið, sum nú verður lagt á sodavatn, er nóg mikið. Hann heldur, at tað eigur at vera so mikið høgt, at tað ordiliga merkist*

Men, hvussu høgt avgjaldið skal vera, vil hann ikki siga enn.

– Lat okkum fyrst síggja, hvussu hetta avgjaldið virkar. Lat okkum so eisini síggja, hvat úrslitið verður av teimum kanningum um matvanarnar, vit nú fara at gera. Úrslitið av øllum tí verður so grundarlagið undir, hvat vit fara at gera frameftir, men endamálið er heilt greitt, at nýtslan av sodavatni og góðgæti skal minkast, sigur Bill Justinussen.

# Dýrari hjá foreldrum at hava børn í ansing í Havn

**Næsta ár er ætlanin at hækka gjaldið, sum foreldur í Havn skulu betala fyri at hava børn í ansing og í frítíðarskúla**

BARNAANSING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Næsta ár fer tað at verða eitt sindur dýrari hjá foreldrum í Havn at hava børn í vøggustovu, barnagarði, ella í frítíðarskúla.

Tað er komið fram, nú býráðið arbeiðir við at leggja fíggjarætlanina fyri komandi ár.

Tá ið lønarsamráðingar verða aftur, eru útlit fyri eini ávísari lønarhækking og tí er ætlanin at gjaldið hjá foreldrunum skal hækka samsvarandi.

– Tað er trupult at meta um, hvussu stór lønarhækkingin verður, men vit hava lagt eitt sindur upp fyri teimum hækkingum,sum helst fara at koma, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

Hann sigur spurningurin um, hvat barnaansing kostar er rættiliga einfaldur við tað, at kommunan betalir 70% av rakstrinum og foreldrini betala 30%. Samstundis eru 90% av rakstrinum lønir til pedagogar og hjálaprfólk og til starvsfólk annars.

– Sostatt er tað beinanvegin, at lønarhækkingarnar gera raksturin dýrari og fyri at vera fyrivarin, hevur býráðið gjørt av at býta eina væntaða lønarhækking ímillum foreldrini og kommununa við 30% til foreldrini og 70% til kommununa.

– Sostatt er lagt upp fyri í fíggjarætlanini, at gjaldið til barnaansingina skal hækka eitt sindur komandi ár, sigur borgarstjórin.

Hvussu stór hækkingin verður, kundi hann ikki siga upp á standandi fót.

Men aðrastaðni í býráðnum hava vit fingið at vita, at frá 1. januar koma foreldur at betala ein lítlan hundraðkrónuseðil meir um mánaðin fyri eitt barn í vøggustovu og einar 50 krónur meir fyri eitt barn í barnagarði og einar 30 krónur meir fyri eitt barn í frítíðarskúlanum.

Í løtuni kostar tað 2.400 krónur um mánaðin at hava eitt barn í vøggustovu, men næsta ár fer prísurin upp á einar 2.500 krónur.

Tó skal viðmerkjast, at foreldur betala bara í 11 mánaðir, tí 12. mánaðurin er feria og hann er ókeypis. Fyri frítíðarskúla betala foreldrini í 10 mánaðir.

Sostatt fer tað næsta ár at kosta foreldrum 27.500 krónur um árið at hava eitt barn í vøggustovu og tað er 1.100 krónur meiri enn í ár.

### Skal merkjast minst møguligt

Men, sum skilst, verður tað ikki uttan víðari, at gjaldið hækkar, tí minnilutin í býtáðnum ætlar ikki at lata tað fara afturvið borðinum.

Leivur Hansen úr minnilutanum, sum eisini er limur í fíggjarnevndini hjá býráðnum, sigur at nú figgjarætlanin hevur verið til viðgerðar, hevur hann fingið ábendingar um, at ætlanin er at hækka foreldraagjaldið til vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla.

Hann sigur, at minnilutin heldur, at talan er um hækkingar, sum fara at merkjast hjá foreldrunum, serliga teimum, sum eiga fleiri børn, men hann vil ikki gera viðmerkingar til, hvussu stórar hækkingarnar vera, fyrrenn fíggjarætlanin er løgd fyri býráðið.

– Men minnilutin heldur, at foreldragjaldið eigur ikki at vera hækkað, uttan so at foreldur fáa onkrar aðrar batar fyri at sviðin skal vera so lítil sum gjørligt.

Hann heldur, at tað kann gerast við at hækka barnafrádráttin og hetta verður helst eitt uppskot, sum minnilutin fer at leggja fyri býráðið í sambandi við fíggjarætlanina komandi ár.

Í hesum sambandi kann upplýsast, at borgarstjórin hevur í farnu viku upplýst fyri Sosialinum, at ætlanin er, at bæði kommunuskattur og barnafrádráttur, skulu verða óbroytt komandi ár, ávikavist 18,75% og 4.500 krónur.

Fíggjarætlanin hjá Tórshavnar Kommunu kemur til fyrstu viðgerð á almennum býráðsfundi hóskvøldið.



*Næsta ár fer tað at kosta foreldrum einar 27.500 krónur tilsamans at hava eitt barn í vøggustovu í Havn. Tað er umleið 1.100 krónur dýrari enn í ár. Gjøldini til barnagarð og frítiðarskúla hækka eisini*

*Myndin er tilvildarlig*